Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

Evni: Kunngerðin um burturkast

Spurningar:

1. Hvussu langt er arbeiðið komið við at gera eina nýggja kunngerð um burturkast?
2. Nær verður nýggja kunngerðin lýst?
3. Hví hevur arbeiðið tikið so langa tíð?

Viðmerkingar:

Verandi kunngerð um burturkast er frá 19. oktober 1995, og ongar broytingar eru gjørdar í henni síðani 2007. Hugburðurin viðvíkjandi burturkasti er nógv broyttur, síðani galdandi kunngerð varð lýst.

Í februar 2020 bað undirritaði, sum tá var landsstýrismaður á økinum, Umhvørvisstovuna um at gera uppskot til eina nýggja kunngerð um burturkast. Tey fingu freist til 1. juni sama ár, tá arbeiðið skuldi vera liðugt. Seinni bleiv pantiskipanin við einnýtisíløtum partur av arbeiðinum.

Arbeiðið dró út, men fyri tveimum árum síðani skrivaði Dimmalætting, at arbeiðið var um at vera liðugt, og at bara nakrir tekniskir smálutir vóru eftir at gera, áðrenn uppskotið kundi latast landsstýrismanninum.

Nú eru aftur tvey ár gingin, og framvegis er kunngerðin ikki lýst. Tí verður hesum fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 29. november 2023

Helgi Abrahamsen